# Sjónleikur um royking

10. september fer sjónleikabólkurin Útskalda at frumframføra leikin »Mín besti vinur« fyri næmingum í Eysturskúlanum og í Nólsoyar skúla. Dagarnar aftan á fer bólkurin at spæla leikin fyri øllum 5. flokkum í landinum. Leikurin snýr seg um royking og setur fokus á ung og royk. Leikurin er sermerktur, tí áskoðararnir sjálvir spæla við og avgera partvís, hvat leikararnir spæla. Hjálmar Dam og Durita Dahl Andreassen manna Útskalda, og tað er Birita Mohr, ið leikstjórnar. Hjálmar Dam er kendur frá jólakalendaranum í SVF »Jólavitin« og hevur verið við í nógvum leikum, kabarettum og lýsingum seinastu árini. Durita Dahl Andreassen hevur fingið undirvísing á Dramaverkstaðnum og sjálv undirvíst í drama. Durita er í løtuni formaður í Ung í Máf. Umframt á Eysturskúlanum verður leikurin, sum er ein partur av átaki hjá Fyribyrgingarráðnum fyri 5. floksnæmingar, at síggja í øllum øðrum skúlum í landinum.





*Henda æðan var illa fyri av oljudálkingini. Sambært innsatsleiðaranum var best at kippa hana*

*Mynd: nud*

# 2000 litrar av olju á Havnarvág

**Oljudálkingin á Havnarvág er sera umfatandi, yvir 2000 litrar eru á sjónum. Men sambært sløkkiliðnum gongur ruddingararbeiðið betur enn, tey høvdu vónað.**

UMHVØRVI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Oljudálkingin á Havnarvág er sera umfatandi, sambært Hans Davidi Hansen, innsatsleiðara fyri Tórshavnar sløkkilið, eru yvir 2000 litrar av olju farnir á sjógv. Men hann sigur, at tað gongur væl við at avmarka dálkingina, og at arbeiðið við at taka oljuna upp gongur betur enn væntað.

Í Vágsbotni er roykurin av olju sterkur, og nógv olja sæst á sjónum. Nakað av fugli er eisini dálka, og tá Sosialurin var á staðnum í morgun gekk ein oljudálka æða úti á skinnarasker. Hans David Hansen greiddi frá, at har var einki annað at gera, enn at kippa hana.

Enn er ikki staðfest hvaðani oljulekin stavar. Hans David Hansen sigur, at umborð á garnaskipinum Nim, ið er á beding á Tórshavnar skipasmiðju, hava tey vátta, at nakað av olju er farið á sjógv, men als ikki so stór nøgd. Eisini hava folk boðað sløkkiliðnum frá, at tey sóu olju á sjónum longu týskvøldið og hetta var, áðrenn Nim kom á beding.

### Kanningar gjørdar í málinum

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur, at kanningar verða gjørdar í málinum, og Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið roynd av oljuni við Eystaru bryggju, í Vágsbotni og við Skinnaraskerð fyri at sammeta hana við oljuna umborð á skipum, ið kunnu hava staðið fyri dálkingini. Vakthavandi hevur ongar viðmerkingar til ákærurnar hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra, og Elini Lindenskov, forkvinnu í Heilsu- og umhvørvisnevndini, um at dálkingarmál ikki verða tikin í nóg stórum álvara av løgregluni. Hon vísir á, at løgreglan savnar prógv í tílíkum málum, og síðani verður málið sent til fútaskrivstovuna, og at tað tí er haðani, at viðmerkingar mugu koma til málið.

# Ábyrgdarleyst sløsarí

**Løgreglan ger ikki nokk at stegða oljudálkarum. Hetta heldur forkvinnan í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu, Elin Lindenskov, sum eftirlýsir betri heimildum at stegða dálkingini**

UMHVØRVI
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Elin Lindenskov, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu, er púra samd við Heðin Mortensen, sum í Sosialinum í gjár segði, at løgreglan ikki fylgir málum um oljudálking nóg væl upp.

- Tað verður altíð tosað um menniskjaligt óhapp. Men tá hesar dálkingar næstan eru dagligur kostur, so er talan meira um ábyrgdarleyst sløsarí enn um óhapp, staðfestir Elin Lindenskov.

Sambært formanninum í Tórshavnar umhvørvisnevnd eru bøturnar so láturliga lágar, at skip ikki taka dálkingarvandan í álvara. Hóast havumhvørvið nú er føroyskt málsøki, og kommunan hevur ábyrgd fyri lokala havumhvørvinum, so er møguleikin hjá kommununi at stegða oljudálkarum ikki nóg góður, heldur Elin Lindenskov.

- Eg kundi hugsa mær, at kommunan fekk møguleika at forða skipum, sum høvdu dálka, at koma inn aftur í Havnina. Sum nú er kunnu vit bara melda lógarbrótarnir, og so hendir onki.

Skal hetta veruliga steðgast má lógarbroyting til, heldur Elin Lindenskov. Landspolitikarnir hava ábyrgd fyri hesum, men higartil hevur politiski viljin at verja umhvørvi ikki verið stórur, heldur hon.

Oljulekar í Havn koma ofta fyri í samband við bunkring. Elin Lindenskov sigur, at hon kundi hugsa sær at oljutangarnir vórðu fluttir úr havnaøkinum, men hesum væntar hon ikki, at meiriluti er fyri í býráðnum.

### Umfatandi dálking

Oljudálkingin í Havn er um alla Vestaru vág innan fyri Tinganes, verður sagt av Sløkkiliðsstøðini.

Teir hava lagt byrgingar út fyri at forða fyri, at dálkingin versnar. Tikið verður so upp, tá tað er gjørt.

Nakað av olju er tikin uppniðan fyri skipasmiðjubygningin við Vestaru bryggju, men nógv er eftir frá Tinganesi inn í Vágsbotn og út móti Skálatrøð.

Sagt verður av Sløkkiliðsstøðini, at líkt er til at mongdin ikki veksur.

Á Sløkkiliðsstøðini siga teir, at teir meta, at einir 1.000 – 2000 litrar av olju eru liknir út á vágna. Men enn er ikki endaliga staðfest, hvaðani oljan er komin.

Onkur fuglur er komin illa fyri av dálkingini. Í morgun var onkur rættiliga dálkað æða at síggja Úti í Bakka.

# Taka dálking í álvara

UMHVØRVI

Karen Marie Olesen fúti avvísur fyri Sosialinum, at dálkingarmál ikki verða tikin í álvara av teimum

Fútin sigur, at eisini hetta málið verður tikið í álvara. Hon vísir á, at vanliga verður bót givin, umframt rokning fyri rudding. Hon sigur annars, at hon ikki ætlar sær at kjakast um hetta mál í fjølmiðlunum.

- Vit hava góðan dialog um dálkingarmál við avvarðandi myndugleikar, so sum sløkkiliðið, kommununa og Heilsufrøðiligu starvsstovuna, og eg vil heldur tosa við kommununa um hvussu tey meta at dálkingarmál skulu loysast á fundi við tey, sigur hon.

Fútin vísir á, at í einstøkum førum kann vera neyðugt við sektaruppskotið, tí talan er um útlendsk reiðarí. Men í hesum konkreta døminum er talan um føroyskt reiðarí, so tí kemur hetta ikki upp á tal, vísir hon á.

**nud**